## Russiski laksamarknaðurin



**Noreg/ Rusland:** Noreg eigur heili 95% av veksandi russiska laksamarknaðinum. Alarar í ES og Chili eiga hinvegin bert 5% av marknaðinum.

Norski laksaútflutningurin til Ruslands er tvífaldaður seinastu tvey árini.

Eftir einki at hava tjent seinastu trý árini, verður mett, at norska laksavinnan í ár fer at hava eitt samlað yvirskot uppá 1,3 miljardir norskar krónur.

**-vj.**

## Chili 38 fríhandilsavtalur

**Chili:** Suðuramerikanska landið, Chili, er nú tann fiskivinnutjóðin í heiminum, sum hevur næst flestar fríhandilsavtalur við onnur lond. Á fyrsta plássi liggur Meksiko. Í dag hevur Chili 38 slíkar avtalur, og hetta vísir, at landið rættiliga er í »fokus« á fiskivinnuøkinum.

Chili hevur fyrimunir av fríhandilsavtalunum og tær avtalur, sum í løtuni hava størstan týdning fyri landið, eru avtalurnar við ES, USA, Meksiko og Kanada.

**-vj.**

# Til lands við daggomlum upsa

**Jørgin Bech heldur, at royndirnar, hann sipar til, eiga at gerast við daggomlum upsa, har fiskurin hjá nøkrum partrolarum verður tikin úti á fiskifeltinum so skjótt, trolposin kemur at borði**

UPSI OG PRÍSUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*– Eg kundi hugsað mær, at eitt skip, sum lá á fiskifeltinum, tók trolposan inn so hvørt, sum hálað verður. Fiskurin verður beinanvegin koyrdur í ísvatn og køldur. Hann verður samlaður saman og førdur til lands daggamal og ókruvdur, sigur Jørgin Bech*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

– Eg kundi hugsað mær, at eitt skip, sum lá á fiskifeltinum, tók trolposan inn so hvørt, sum hálað verður. Fiskurin verður beinanvegin koyrdur í ísvatn og køldur. Hann verður samlaður saman og førdur til lands daggamal og ókruvdur. Skipini, ið tóga, kunnu fáa trolposan aftur so hvørt – ella, meðan tey tóga við einum øðrum trolposa undir.

Jørgin Bech sigur, at fiskurin nú verður førdur til lands og virkaður á tann hátt, at upsaflakið verður býtt í tvey – tann hvíti parturin av flakinum fyri seg og spiklagið fyri seg.

– Slíkar royndir meti eg kunnu byrja beinanvegin og áðrenn maskinan, sum brúkast skal til endamálið, er tøk, kann upsin arbeiðast uppi á landi við handamegi. Síðan skal vøran marknaðarførast í tveimum, har tað hvíta flakið sum flak ella portiónir verður selt fyri seg og tað, ið eftir – tað myrka spiklagið – fer fyri seg.

Hann vísir á, at ein trupulleiki við upsanum er, at fiskurin gerst misjavnur til dygdar, tá ið hann liggur leingi á dekkinum. Hálini eru stór, fiskurin smáur, og tað tekur sjálvsagt sína tíð hjá manningini at fáa fiskin kruvdan og ísaðan.

Jørgin vísir á, at vit fiska eini 40.000-50.000 tons av upsa um árið, og kemur bert eitt oyra aftrat rávøruprísinum, er ein hálv miljón krónur meira at tjena – og 10 oyru í meirprísi geva 5 miljónir!

Hann sigur, at fekst upsin daggamal og ókruvdur til lands, høvdu eisini møguleikar ligið í at fingið okkurt burtur úr innvølunum.

– Eg ivist onga løtu í, at slíkar royndir høvdu verið viðvirkandi til, at vit fingu ein hægri upsaprís, sigur Jørgin Bech.

Lesið eisini grein á baksíðuni.





TÆR BESTU OG BÍLIGASTU LOYSNIRNAR TIL SKIP & BÁTAR

| | |
|---|---|
| GDSS - Radioútgerð | Furuno / Sailor / I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno / Simrad |
| Ekkolodd - útgerð | Furuno / Simrad |
| Sonara - úgerð | Furuno / Simrad / Kaio |
| Navigatióna-útgerð | Furuno / Simrad |
| Navigatións plottara | Furuno / MaxSea / Simrad |
| Autopilot - Stór og lítil skip | Furuno Robertson / Sperry |
| Autopilot - Til bátar | Timco |
| Satellite Kumpas - 3 x GPS | Furuno |
| Satellite - Navigation | Furuno / Simrad / JRC |
| Satellite - Kommunikations | Furuno / T&T / Sailor |
| Satellite - Sjónvarp | Applied / SeaTel |
| Trol sensorar og kabinett | Scanmar / Simrad |
| Gyrokompass | Sperry / C-Plath / Anschutz |

**Søla og Service**
Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Servie, sum vit eisini gera.

**SP/F CONTRIVE JSP LTD.**
FO-700 KLAKSVÍK · TEL 45 52 44 - 21 42 44 · FAX 45 69 45 · E-MAIL: CONTRIVE@CONTRIVE.FO





EITT TEKIN UM NÝGGJAR TÍÐIR Í FØROYSKA FÍGGJARHEIMINUM

Kaupthing hevur fingið nýtt búmerki. Okkara mál er, at merkið skal umboða tær mest slóðbrótandi og nýskapandi tænasturnar, ið verða veittar á føroyska fíggjarmarknaðinum. Kaupthing bjóðar fram lán til vinnulívið, vinnuráðgeving, ognarrøkt og handil við virðisbrøvum. Vit seta tørvin hjá viðskiftafólkunum í miðdepilin.

www.kaupthing.fo

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag